Mentamálastýrið

Deildarstjóri til Fólkaskúladeildina

ar

Nú deildarstjóri okkara fer úr starvi fyri aldur, er eitt áhugavert og fjøllbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Fólkaskúladeildini.

Mentamálastýrið er skipað í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild.

Høvuðsuppgávurnar hjá Fólkaskúladeildini eru at:

- Fyrisita hægru umsitingina av fólkaskúlanum og øðrum skúlum og stovnum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar og stovnarnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, gera uppskot um lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við aðrar skúlar o.o., ið varða av økinum

Deildarstjórin er leiðari á Fólkaskúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

r e kakr

Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava

- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella læraraútbúgving við viðkomandi eftirútbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt menn-andi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við aðrar skúlar og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

b a

Mentamálastýrið mennist alsamt, og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

e anar nar re r

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Møguleiki er fyri, um so er at umsøkjari er tænastumaður frammanundan, at halda fram sum tænastumaður. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá Tænastumanna-felagi Landsins.Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fatar um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

kn

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2001. Starvið verður sett frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálastýrinum, á tlf.

Men a a r *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
Í ***ka k a e n*** *eru fólkaskúlarnir (uml. 60 í tali), Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð, Musikkskúlar, Sernámsfrøðiligt virksemi, Føroya Skúlabókagrunnur, Føroya Fólkaháskúli, Húsarhaldsskúli Føroya og frítíðarundirvísingin.*

Skrivstovufólk

Søkt verður eftir avloysara fyri skrivstovufólk í burðarfarloyvi at byrja 1. juli 2001 ella skjótast til ber. Starvstíðin verður í fyrsta lagi til mars 2002. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Uppgávur
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at samskipa eftirkanningina av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og at fyrireika kunngerðingina av lógum og kunngerðum í Kunngerðarblaðnum. Starvið fevnir eisini um at hjálpa til við øðrum uppgávum í Ritaraeindini og í Løgmansskrivstovuni annars.

Faklig førleikakrøv
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving.

Persónlig førleikakrøv
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál og duga at arbeiða við telduforritinum Word.

Starvsstaðið
Starvsstaðið er í fyrsta lagi í Ritaraeindin og annars øll Løgmansskrivstovan.

Løn og setanartreytir
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til John Rajani, løgmansritara, tlf. 351010.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Tinganes - Postrúm 64
FO-110 Tórshavn

og skulu verða Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 25 juni.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir. Ritaraeindin hevur umframt at verða forskrivstova løgmans ábyrgd av samskipandi uppgávum

CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.
HOL SAGING
Frá 2 mm. til 50 mm.
GÓLV FRESING
GÓLV SLÍPING
GÓLV SAGING
ennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.
Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.
FØROYA BETONG SAGING
v/Hjaltur Tausen
erðisvegur • 620 unavík • Tel. 75 3 • Fax 88 8
Sosialurin nr. 31/1620

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

NISSAN BLUEBIRD 2,0 LX
T 12 model, til sølu fyri 10.000 kr. Sýnaður 29. mai 01. Stereoanlegg fylgir við.
Tlf. 312880 - 251158

FORD MONDEO
vunnin í V4, til sølu við avsláttri.
Tlf. 253231

TOYOTA YARIS
2 ára gamal svartur Toyota Yaris til sølu.
Tlf. 226251

TIL SØLU
Mazda 323, árg. 86, sýnaður í juni 01, ongan kross, í sera góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 255056

TIL SØLU
Mazda 323 typa B.D., árg. 85, í góðum mekaniskum standi, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 255056

EYKALUTIR
Nakrir eykalutir til Citroën Xantia, árg. 5/97: Høgri forskermur, høgra hurð, høgra bakhurð, baklúka, bakljós, tríggjar sportsfelgur, eitt nýtt dekk við vanligari felgu. Allir eykalutirnir siggja út sum nýggir.
Tlf. 423135, um kvøldið

SKIFTA BILIN ÚT!
Hygg so her. Vit útvega brúktar kvalitetsbilar úr Týsklandi fyri sera sámuligar prísir. Væntandi fara vit niður í næstum.
Tlf. 215464 ella 217790

VW GOLF
VW Golf diesel, árg. 12/89, til sølu. Bilurin hevur sportsfelgur og fýra vetrardekk á felgum fylgja við.
Tlf. 222559, e. kl. 19

TIL SØLU
16" OZ-Supertourismo v/ Michelin Exalto dekkum til Peugeot, std. 195/45, 16
sera lítið slitin

FORD ESCORT 1.6 CL
Árg. 86, skal til sýn. Hevur sportsfelgur og Sony 10X multi disc system. Til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 226189

TOYOTA COROLLA 1,3 XLi
árg. 91, nýsýnaður, hevur sportsfelgur. Pikadekk á felgum fylgja við. Koyrt 135.000 km.
Tlf. 443141 - 252072

TIL SØLU
Daewoo Leganza 2.0 SX, árg. 5/99, 16.000 km. Bilurin er svartur og hevur 16" sportsfelgur, el-rútar, sentrallás og Pioneer radio/fløguspælara.
Tlf. 243734

OPEL ASCONA 1.6 S
árg. 86, til sølu sum eykalutir fyri 2.000 kr.
Tlf. 455405

VW GOLF 1,8
frá juni 89, koyrt 179.000 km, í góðum standi, itl sølu.
Tlf. 455984 - 215984

TIL SØLU
Nissan Bluebird T 12 1,6, árg. 89, sera góður til eykalutir, men kann eisini gerast í stand. Í góðum mekaniskum standi. Kostnaður uml. 4.000 kr.
Tlf. 255056

BUSSUR
Nissan King Van árg. 91. Nýggj dekk, góður mekaniskur standur, men nakað av rusti - skal sýnast. Kr. 9.900,-Opel Astra Stationcar 1,7 Diesel árg. 92. Sportsfelgur og nýggjari dekk á felgum fylgja við, er í góðum standi
Tlf.225388

MAZDA 323
1.3 bensin, sýnaður 23.2.2001. Bilurin hevur nýggjan bensintanga, bakhjólsleiðir, kølara, róðurlið og er í góðum standi. Til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 287273

SKIFTA BILIN ÚT?
Hygg so her, vit útvega brúktar kvalitetsbilar úr Týsklandi fyri sera sámuligan prís. Væntandi fara vit niður í næstum.
Ring 215464 ella 217790

OPEL KADETT 1,3
árg. 89 til sølu fyri uml.15.000. Hevur koyrt 97.000 km.
Tlf. 313946, aftaná kl. 17.00

TIL SØLU
Myrkagrønur Rover 620i til sølu, árg. 96, hevur koyrt 75.000 km, hevur sentrallás og el-rútar framman. Bilurin er í góðum standi og til sølu fyri sámuligan prís.
Ring 253973

TIL SØLU
Citroen BX 16 RE, árg. 88, í góðum standi, sýnaður 2000, til sølu fyri ca. 10.000.
Tlf. 252975 eftir kl. 17

FORD SIERRA 1800
vínreyður, árg. 89, vanl. bensin, sóltak, sýnaður í feb. 2001, ongan kross. Koyrir væl. Prísuppskot 10.000 kr.
Tlf. 421424 eftir kl. 18

VOLVO 240
sum eykalutur settur vegna rust. Koyrir og hevur powerstýring.
Tlf. 253347

TOYOTA CARINA II 1.6
árg. 90, í góðum standi til sølu, sýnaður apr. 01.
Tlf. 421322

KIA PRIDE 1,3 DELUXE
árg. 98, 24.000 km, 3 hurðar, sportfelgur + eykadekk v/ skálum, koksgráður, økonomiskur og sum nýggjur til sølu. Prísuppskot: 78.000,-
216396

Til sølu!
Toyota Carolla 2,0 Diesel. Árg. 9/99, koyrt 67.000 km., 16" sportfelgur, pikadekk á felgum.
Tlf. 421317 / 211317. Best eftir kl. 15.30

TIL SØLU
Tak bagaguberari/boylar til Honda Accord til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 319310, e. kl. 16

Til sølu
Honda Accord 2,0 EX, árg. 86. Spoylara framman, vel, sportfelgir, sleipikrók. Hevur koyrt 250.000 km. er í sera góðum standi.
Tlf. 211235

Ynskist
Man. gearkassi til Mazda 626 árg. 87-89, ella bilur sum eykalutir, ynskist til keyps.
Tlf. 222324

Toyota camry
til sølu. Nýsýnaður. Prísur 14.000, skal bileggjast.
Tlf. 253242

REYÐUR TOYOTA COROLLA
L/B til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 315065

DAIHATSU CHARMANT
árg. 12/85, sýnaður í 11/2000, vælhildin, einans koyrt 80.000 km, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 319263

Renault 19
Árg. 1989, koyrt 161.000 km. Nýsýnaður, til sølu.
Tlf. 444153

Volvo 740 GLE
Við skaða biliga til sølu.
Tlf. 223243

MAZDA 323 SEDAN
Nýsýnaður, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 314245

FORD FIESTA 1,1
til sølu. Krevur ábøtur, hevur alu. felgur við nýggjum dekkum + anhangara, gjørdur úr einum Fiesta.
Tlf. 315713, e. kl. 17

TOYOTA HIACE 2.4
Ein 1 ára gamal hvítur Toyota Hiace 2.4 Turbo diesel 4 wd til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur koyrt 13.000 km.
Tlf. 213323, 321304 ella 313363

CITROEN XANTIA 1.9 TD
árg. 10/98, koyrt 80.000 km, er væl hildin til sølu.
Tlf. 251867 ella 332967 eftir kl. 17

TOPPSTYKKI
Eitt toppstykki ynskist til keyps til ein VW Transporter 1600 Turbo, frá 1986.
Tlf. 422145

SUMMARDEKK
Fýra sera góð summardekk 155/13 á felgum til sølu.
Tlf. 316447

NISSAN PATROL JEEPUR
árg. 86, stytra modellið, hevur ymisk brek. Kostnaður uml. 10.000 kr.
Tlf. 316946

KRÓKUR
til Ford Escort bíliga til sølu, ongantið brúktur.
Tlf. 317583

GOTT KEYP
Til sølu vegna flyting er ein Opl Vectra 2.0 Turbo diesel, 4 ára gamal, koyrt 75.000 km, metalbláur, CD-spælari, sportfelgur, fýra nýggj pikadekk á felgum við í keypinum. Prísur 135.000 kr.
Tlf. 421257 ella 253406

MITSUBISHI PAJERO
4 x 4 stuttur. Motorur og gearkassi ok, plátudeilir rustaðir, ramman ok.
Tlf. 318951 ella 215200

PÍKADEKK
13" pikadekk á felgum bíliga til sølu. Bert brúkt ein vetur.
Tlf. 318274

TOYOTA CAMRY 2.0 GLI
árg. 86, 107 HK til sølu.
Tlf. 321342

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur við lítið slitnum Good Year dekkum, 195/60 R15 2 x 5 hol, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 444677 ella 222544

OPEL KADET 1,6 LS
árg. 85, í góðum standi, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 457136 ella 214216

TOYOTA CAMRY 2000GLI
árg. 86 til sølu, sýnaður december 2000 er í góðum standi. Prísur 14.000 kr.
Tlf. 218900

NISSAN URVAN
árg. 86, diesel, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 281930

BMW 524 TD
árg. 89, hevur el-rútar, sóltak, el-spegl, er økonomiskur. Bilurin er vælhildin og nýsýnaður.
Tlf. 252072

OPEL ASCONA
Opel ascona 1.6s árg. 88 hevur koyrt 182.000 Í góðum standi hevur sóltak og sportsetur. Til sølu fyri uml. 14.000 kr.
Tlf. 421543 ella 250832

TIL SALG
Páhængsvogn, mærke Variant, længde 3.25 m, lastevne 500 kg, forhøjet sider.
Tlf. 447501

Amboð

TIL SØLU
Casorzo P 95 sláimaskina, liggjabreidd 107 cm, í góðum standi, til sølu fyri 11.000 kr.
Tlf. 317636

BRØYT YNSKIST
fyri sámuligan prís. Rustur ella smávegis brek ongan týdning.
Tlf. 216600

SLÁIMASKINA
Ein Electrolux sláimaskina til sølu, breidd 42 cm. hevur hjóluppsamlara, bara brúkt einaferð. Til sølu fyri 2.000 kr. fyrr 2.495,-
Tlf. 448097

BRÚKTAR TEKKO
forskallingar 90 x 90 eru á goymslu. Forskallingslutir sum olja, konus, avstandsrør o.a. Blandimaskinur 130 -1000 ltr.Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

HMF KRANI
7 tons, sera bíliga til sølu.
Tlf. 223039

BORÐSAG
Næstan nýggj borðsag, nýprísur kr. 9.900,- til sølu fyri 6.500,-
Tlf. 212358

Arbeiði

HÁRFRÍÐKAN
Dámar tær at arbeiða við hár og make-up, er eitt pláss í Tí Føroyska Hárfriðkanarskúlanum. Skriva nøkur orð um teg sjálvan og send til T.F. Hárfriðkanarskúlan, N. Finsensgøta 10, Tórshavn.
Tlf. 316515

SØKT VERÐUR EFTIR
álítandi fólki at arbeiða í døgurðatímanum mánadag-fríggjadag. Fish & Chips, Vagliið
Tlf. 317405 ella 320220

ARBEIDI SØKIST
16 ára gamal drongur søkir arbeiði í summar. Alt hevur áhuga.
Tlf. 315723

PRAKTIKANT SØKES
til fjellgárd í Norge. Hereford ammekyr, skogbruk, litt turisme, vanlig gárdsarbeide, kjøring med sledehunder om vinteren. Mye jakt! Kost og logi på gården. Se gården på http://home.online.no/~sfloettuE-post: sfloettu@online.noSvein Fløttum. Ravnås Gård. 7387 Singsås.
tel:++72 43 56 52.

EG GANGI
á 16. ári og vildi fegin fingið okkurt arbeiði í frítíð míni.
Jákup - tlf. 316606

ARBEIÐ YNSKIST
20 ára gomul genta ynskir arbeiði í Havn í summarfrítíðini t.d. á skrivstovu. Kann byrja 28. juni.

Havi studentsprógv, teldukunnleika og koyrikort.
Ring 253071

TILBOÐ YNSKIST
at mála eini hús.
Ring 216240 ella 316240

Barnaútgerð

BRIO STÓLUR
við galesju til sølu.
Tlf. 421597

TIL SØLU
Gráur Brio barnavognur og ein bilbarnastólur, 0-18 kg, til sølu. Er væl viðfarið.
Tlf. 319919

TIL SØLU
Lítið brúktur, vælhildin, myrkabláur Brio koyristólur við posa til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 317592

TIL SØLU
Ljósagrá leðurlook babylift kr. 200,- Skrástólur kr. 200,-
Tlf. 318014

TIL SØLU
Myrkagrønur Brio barnavognur til sølu vegna flyting.
Tlf. 375445

BRIO KOYRISTÓLUR
leðurlook, 1800 kr. Pusliborð við skuffum 500 kr. Bilstólur 0-13 kg. 500 kr. Skrástólur 200 kr. Bert brúkt til 1 barn.
Tlf. 222682/372008

Bátaútgerð

MOTORUR
Yamaha 20-22 hesta motorur til sølu.
Tlf. 313285

TIL SØLU
26 fót Myra plastbátur, 71 hk Solé Merzedes, 3 aut. oljutrýst snellur og nógva útgerð. Byrjunar prísuppskot 200.000 kr.
Tlf. 220422

TIL SØLU
Ein 68 HK Saab Ford bátamotorur árg. 1976 við umstýring og nýggjum aksli og skrúvu. Bíliga til sølu.
Tlf. 224942

BÁTAMOTORUR
Volvo MD 7, 13-14 HK ynskist til keyps.
Tlf. 441451

TIL SØLU
Bátamastur úr aluminium við toppljósi, hekkuljósi og radarreflektor, stendur á rustfríum stativi við plássi til radara. Ca. 115 cm høg. Kann leggjast niður við hongsli í fótinum, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 216400

TIL SØLU
Volvo Penta Tamp 40, 165 HK v/ turbo, koyrt uml. 1500 tímar, bíliga til sølu.
Tlf. 317666

BÁTAR TIL SØLU
Glastrevjabátur - 5 m langur við Johnson 25 hk páhangara í góðum standi, umframt vognur til sølu.
tlf. 31 86 57 og 31 10 38

Bingo

TVØROYRAR KLUBBI
hevur bingo leygarkvøldið 9. juni kl. 20.00.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Havnar Klubba mánadagin 11. juni kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar, m.a. ein flogferð.
Spastikarafelagið

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki